**Lóg fyri Skopunar Bygdarsavn**

§ 1. Skopunar fornminnisfelag og Skopunar bygdarráð seta á stovn sjálvognarstovnin Skopunar bygdarsavn.

§ 2. Endamál stovnsins er innan Skopunar kommunu

**at** fremja varðveitingararbeiði Skopunar fornminnisfelags av fornminnum og forngripum, serstakliga húsini hjá Alexanduri.

**at** savna og skráseta forngripir og annað siðsøguligt tilfar.

**at** seta upp siðsøguliga framsýning.

§ 3. Savnið verður stýrt av fimm-mannanevnd, har tríggir limir verða valdir av Skopunar fornminnisfelag og tveir limir av Skopunar bygdarráð. Nevndin skipar seg sjálv. Nevndin stendur aðalfundi Skopunar fornminnisfelags og Skopunar bygdarráði til svars fyri ognum og rakstri savnsins.

§ 4. Gevst savnið við virki sínum, verður farið fram eftir grein 3, stk. 3 í løgtingslóg nr. 17 av 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentunnarsøguligum virksemi.

Soleiðis samtykt á eykaaðalfundi Skopunar fornminnisfelags tann ______________
og á fundi í Skopunar bygdarráð tann ______________